Oljumálaráðið

# Fulltrúi til útjaðaramál og lendisskipan

Við hesum verður eitt starv sum fulltrúi í Oljumálaráðnum lýst leyst at søkja. Gjørt verður vart við, at líknandi starv varð lýst leyst á Løgmansskrivstovuni í vetur. Umsøkjarar, ið lótu inn umsókn um tað starvið, mugu søkja av nýggjum, tí starvsuppgávurnar eru broyttar nakað, eftir at útjaðaramál vórðu flutt til Oljumálaráðið at umsita.

**Uppgávur**
Høvuðsuppgávan verður at samskipa útjaðarapolitikk landsstýrisins og at arbeiða víðari við eitt nú teimum tilmælum, ið vóru løgd fram í Økismenningarálitinum og Útoyggjaálitinum. Harumframt skal fulltrúin taka sær av málsviðgerð á byggi- og býarskipanarøkinum umframt at taka lut í arbeiðinum at dagføra lóggávuna á hesum øki.
Talan er um eitt fjølbroytt og krevjandi starv við nógvum avbjóðingum.

**Faklig førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava viðkomandi útbúgving. Umsøkjarar við royndum á starvsøkjunum kunnu hava fyrimun.

**Persónlig førleikakrøv**
Umsøkjarar eiga at hava góð samstarvsevni, vera fyritakssamir, kunna arbeiða sjálvstøðugt,
og vera til reiðar at ganga nýggjar leiðir.

**Løn og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Oljumálaráðið við tilhoyrandi stovnum og miðfyrisitingina.

**Nærri upplýsingar um starvið**
Umsøkjarar eru vælkomnir at seta seg í samband við Oljumálaráðið á tlf. 357070 og tosa við Rók Tummasarson, deildarleiðara fyri at hoyra meira um starvið.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, C.V. og møguligum viðmælum skulu sendast til:

**Oljumálaráðið**
Postsmoga 3059
FO-110 Tórshavn

Umsóknarfreistin er 11. oktober 2002. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Starvið verður sett skjótast til ber.

Oljumálaráðið er skipað undir landstýrismanninum í olju- og umhvørvismálum. Ráðið umsitur kolvetnismál, jarðfrøðilig mál, orkumál, umhvørvismál, havumhvørvismál, náttúrumál, skógarrøkt, lendisskipan og útjaðaramál. Uppgávurnar hjá ráðnum fevna um lógarsmíð, loyvisveitan, eftirlit, kæruviðgerð o.a. á hesum økjum.

Sosialurin
www.sosialurin.fo

# KUNNGERÐ

**um matrikulering í Vestmanna**

Eftir § 38 í løgtingslóg nr. 64 frá 11. des. 1962 um matrikulering og sundurbýti v.m. verður farið undir eigindómsávísing fram við fjøruni niðan undir vegin frá Stígum inn til Fossá.

Orsøkin til hesa eigindómsávísing er, at munalig avvik í fleiri førum eru millum matrikul, tingbók og tey veruligu eigindómsviðurskiftini í økinum, og verða tí allir eigarar og onnur, ið varða av ognum í økinum, boðaðir at møta.

Eigindómsávísingin byrjar týsdagin 8. oktober kl. 9. Byrjað verður við uttasta neystið í grótbrotinum. Arbeiðið verður gjørt samsvarandi § 3-11 í matrikuleringslógini.

Tá rættingarnar eru gjørdar, verða tær sendar Landsstýrinum, ið við almennari stevning leggur sak við Føroya rætt mót øllum og einum, ið hava mótmæli móti rættingunum, og at tær verða gjørdar í matriklinum og tingbókini.

Rættarmálið verður havt í rætti allar vanligar tingdagar, frá tí degi stevningin fyrstu ferð er lýst, og til stevnufreistin er farin.

Bygdarráðið skal velja tveir mans at hjálp Matrikulstovuni við at greiða eigindómsviðurskiftini.

**Matrikulstovan**
tann 20. september 2002

Brandt
Blomberg
Hvítvørur til føroyska húsarhaldið




- 6 kg turr klæðir
- 600-1600 snúningar
- Tíðarstýring 1-24 tímar
- Orkuklassi A
- Vaskievni A
- Centrifugeringsevni A

prísur fyrr 9.995,-

pf Klement Petersen
Høgaból • 600 Saltangará • tel. 447560 • fax 448460

# Diabetesfundur í Sandoynni

Diabetesfelag Føroya skipar fyri fundi um diabetes í Bygdarhúsinum í Skopun sunnudagin 22. september kl. 15.00. Jógvan Róin fyrrverandi yvirlækni greiðir frá.

Fundurin er almennur.

**Diabetesfelag Føroya**

**Skeiðsdepilin við Marknagil – SDM**

TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN

## Skeið til
# Teldukoyrikort
## mikudagar kl. 16.15-20.00

| Skeið | Dagar | Kostn. |
|---|---|---|
| Windows | 2/9, 9/10, 16/10 | 1900 |
| Word | 23/9, 30/10, 6/11, 13/11 | 2600 |
| Excel | 20/11, 27/11, 1/12, 4/12 | 2600 |
| Access | 8/1, 15/1, 22/1, 29/1 | 2600 |
| PowerPoint | 5/2, 12/2 | 1500 |
| Internet | 12/2, 19/2, 25/2 | 1900 |
| Grundskeið í teld | 5/3, 12/3, 19/3 | 1900 |

**Fyri tey, ið melda seg til øll sjey skeiðini er kostnaðurin kr. 10.000,-**

**Skeiðsdepilin við Marknagil**
Marknagilsvegur 77, postsmoga 177, 110 Tórshavn
Tlf. 318813, fax 313374,
t-postur mb@hsh.fo

# Húsavørður

Søkt verður eftir húsavørði við Sandoyar Meginskúla.

Tað er ein fyrimunur at hava handverkaraútbúgving.

Nærri upplýsingar um løn og starvsøkið fáast við at venda sær til formannin fyri Skúlasambandið.

Umsóknir skulu vera nevndini í hendi í seinasta lagi 14.10.2002.

**Sandoyar Skúlasamband**
Meginskúlin
Eyðun Mohr Viderø, form.
210 Sandur

# Kirkjukórið Ljómur

Venjingin er byrjað aftur. Vit venja í Vágs skúla hvørt tórskvøld kl. 19.30.

Nýggir sangarar kunnu koma við. Klaus Telling er kórleiðari.

**Nevndin**

# Sethús í Runavík

Sethús við Gerðisvegin í Runavík til sølu um nóg høgt boð fæst.

**Tlf. 220772**



Brandt
Blomberg
Hvítvørur til føroyska húsarhaldið




pf Klement Petersen
Høgaból • 600 Saltangará • tel. 447560 • fax 448460

Brandt
Blomberg
Hvítvørur til føroyska húsarhaldið
Turkitrumla
5 kg av klæðum
Tíðarstýrd til lágan og høgan temperatur
prísur fyrr 5.395,-
Nú 4.795,-



pf Klement Petersen
Høgaból • 600 Saltangará • tel. 447560 • fax 448460



HONDA
• Streymgeneratorar
• Vatnpumpur
• Grund/Dykkpumpur
• Sláimaskinur
• Bátamotorar
Sosialurin - 311820
Kaj Andreasen & Co
Heilsøla, smásøla og umboð - Tel. 315600 - Fax 318008




**Vika 38 – 18. sept.**
Vinnaratøl: **13 - 14 - 30 - 33 - 38 - 40**
Eykatøl: **32 - 42**

| | |
|---|---|
| 6 vinnaratøl: | 1.672.012,- kr. |
| 5 vinnarat.+ eykatal | 358.840,- kr. |
| 5 vinnaratøl: | 6.010,- kr. |
| 4 vinnaratøl: | 141,- kr. |
| 3 vinnaratøl: | 43,- kr. |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

## VALUTAKURSIR

| | | 18.09.02 | Ultimo august |
|---|---|---|---|
| USA | Dollarar | 763,9000 | 755,6800 |
| Bretland | Pund | 1176,2000 | 1160,4400 |
| Svøríki | Króna | 81,3800 | 81,0900 |
| Noreg | Króna | 100,8700 | 100,4600 |
| Sveits | Frankur | 505,7100 | 504,5200 |
| Ísland | Króna | 8,6100 | 8,4900 |
| Kanada | Dollari | 481,4600 | 485,0500 |
| Japan | Yen | 6,2691 | 6,3900 |
| | Evra | 742,8900 | 742,5300 |

FØROYA SPARIKASSI

# KROSSORÐ



**Vinnari:**
*C. M. P.*
*Jóansgøta 1*
*188 Hoyvík*

## Loysnin frá seinastu viku
## Loysunarorðið: FISKASTERTUR



**Hvønn fríggjadag**
er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum næsta fríggjadagin.

Sendið loysunarorðið til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn – og viðmerkið »Krossorðagáta nr. …« á bjálvan.

313

**Loysunarorðið:** ..............................................

Navn: ..............................................

Bústaður: ..............................................

Bygd/býur: ..............................................

***Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!***

Frá ***BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:***

- ❑ **Úti á leysum oyggjum** - *Marianna Debes Dahl*
- ❑ **Matur í myndum** - *Sigrid Dalsgaard/ Beinta Johannesen*
- ❑ **Í skýmingini** - *Sofía Petersen/Elinborg Lützen*
- ❑ **Meistarin og teir fýra skrivararnir** - *Ulf Nilsson/Karl N. Hansen týddi*

Frá ***FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:***

- ❑ **Málllæra** - *Paulivar Andreasen/Árni Dahl*
- ❑ **Rura** - *Þóra Þóroddsdóttir*
- ❑ **Føroya jarðfrøði** - *Jóannes Rasmussen*
- ❑ **Íslandsklokkan** - *Halldór Laxness*
- ❑ **Fólk og mentan** - *Jóan Pauli Joensen*

***Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt***